

## Fyrilestur um ov tíðliga fødd børn

Í morgin klokkan 17 skipar Prematur felagið fyri fyrilestri í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum. Prematur-felagið varð stovnað í fjør heyst, og er endamál felagsins at hjálpa foreldrum at børnum, sum eru fødd ov tíðliga. Í Føroyum finnast ikki hagtøl fyri hetta, men í Danmark verður sagt, at 6% av børnum verða fødd ov tíðliga. Fyrilesturin í morgin er fyrsta tiltakið, sum felagið skipar fyri, og er tað Jonna Jepsen úr danska Preem Team, sum fer at halda fyrilesturin, ið er ætlaður bæði foreldrum, avvarðandi og fakfólki. Jonna Jepsen átti sjálv tvíburar í 1992, og komu hesir í verðina tríggjar mánaðir ov tíðliga. Síðani 1994 hevur hon arbeitt við teimum trupulleikum, sum prematur børn hava. Hetta við serligum atliti til sálarligu og sansamotorisku seinfylgjurnar, sum hesi kunnu fáa. Tiltakið er ókeypis.

# gramm

### Hildu hann vera mammutan

Sunnvá royndi at byrja so varðisliga sum møguligt í dagrøktini, tá Benjamin var 13 mánaðir. Hon var ein hálvan til ein tíma við honum um dagin, og hann var ongantíð einsamallur, men kortini gjørdist hann so móður, at hann misti svøvnin.

- Eg fór til læknan at søkja mær ráð, men hann helt tað ikki vera nakran trupulleika. Drongurin var bara mammutur, og skuldi bara venja seg við at vera burtur frá mær.

- Hesa tíðina hevði Benjamin ótrúligan kontakttørv. Hann skuldi liggja uppi á mær, tá ið hann svav, og hann kroysti sítt høvd upp í mítt høvd.

Hetta vardi í seks vikur, so orkaði Sunnvá ikki meira. Hon setti seg í samband við danska prematurfelagið, og har fekk hon tað vitan, henni tørvaði.

- Í danska prematurfelagnum kundu tey greiða mær frá, at sansirnir ikki vóru fult mentir, og tí fekk hann lættliga stress. Hetta var vanligt fyri ov tíðliga fødd børn, og tí skuldi eg ansa eftir ikki at overva hann. Danska felagið ráddi mær til at fara til fysioterapeut og kraniosakrala terapi.

- Eg hevði ongantíð hoyrt um kraniosakrala terapi og helt ikki at tað var í Føroyum. Men eg fór til lækna og spurdi, um eg kundi fáa ávísing til fysioterapeut. Men tað vildi hann ikki geva mær. Fysioterapeuturin fór bara at kína honum, og tað kundi ikki gera so nógvan mun, segði læknin

### Kunning eingin sjálvfylgja

Hetta kundi Sunnvá ikki góðtaka. Hon setti seg í samband við Tóru Tóroddsdóttir – eftir at hava lisið bók hennara, Rura. Og Tóra Tóroddsdóttir ráddi hana til ein ávísan fysioterapeut.

- Hjá fysioterapeuti lærdi eg, hvussu eg kundi hjálpa Benjamin við at busta honum um rygg og armar, og hetta gjørdi mun. Hann fekk svøvnin aftur.

Á jólum gavst fysioterapeuturin tó, og Sunnvá hevur ikki funnið nakran nýggjan.

- Tað er ikki lætt at finna fysioterapeutar, sum hava tíð, sigur hon. Fyri stuttum avgjørdi hon at kanna kraniosakrala terapi og fann út av, at tað vóru minst tríggir viðgerarar í Føroyum.

- Benjamin hevur bara verið til eina viðgerð, so eg veit ikki, hvussu nógv tað hjálpir enn. Men eg havi góðar vónir.

- Eg havi fingið nógv góð ráð frá bæði fysioterapeuti, danska prematurfelagnum og Sernámsdeplinum. Men hevði eg ikki sjálv kannað og gravað, hevði eg einki vita.

Sambært Sunnvá hevur tað alstóran týdning, at læknar og heilsustarvsfólk søkja sær vitan um ov tíðliga fødd børn, tí foreldur vita so lítið, at tey enntá ikki vita, hvat tey skulu spyrja um.

### Mist trý børn

Benjamin er fyrsta livandi barnið hjá Sunnvá og Dagfinn, men hon hevur mist trý børn. Fyrst misti hon tvillingar, tá hon var komin 16 vikur, og síðani átti hon deyðfødda dóttir í 26. viku.

- Tá visti eg ikki hví, men eftir at Benjamin varð føddur, staðfestu læknarnir, at tað uttan iva var fosturvatnseitran við hinum børnunum eisini.

Tað er hart fyri Sunnvá at hugsa aftur á tíðina við dóttrini. Tí hon varð deyðfødd bara tríggjar vikur yngri enn sonurin.

- Eg gekk bara tríggjar vikur longri við Benjamini, og tað er ringt ikki at vera beisk, tá eg hugsi aftur. Eg kom á sjúkrahúsið mánakvøld, og tá var hon á lívi. Læknarnir søgdu, at um eg var komin tvær vikur longri, høvdu teir givið mær keisarasnitt, og hon hevði livað. Men í 26. viku vildu teir einki gera.

Mikudag var dóttirin deyð, men ikki fyrr enn fríggjadag átti hon hana. Læknarnir vildu ikki geva keisarasnitt, tí tað varð hildið at vera betri fyri hana psykiskt at fara gjøgnum føðingina.

- Tá fríggjadagurin kom var eingin psyka eftir, og eg skilji framvegis ikki, hví læknarnir ikki kundu geva mær keisarasnitt, sigur Sunnvá Tausen, sum síðani hevur møtt fleiri børnum, sum eru fødd í bæði 25. og 24. viku og eru sterk og væl fyri.

- Einasta kanning av dóttrini var av hjartaljóðinum. Ongar aðrar metingar vórðu gjørdar, sigur Sunnvá Tausen hugsunarsom.

### Stuðla hvørjum øðrum

Tá dagrøktin var ov nógv til lítla son hennara, mátti Sunnvá finna eina aðra loysn. Tí arbeiðir hon í dag 15 tímar um vikuna sum hjálparlærari í Eiði, har mostir hennara býr.

- Eg og Benjamin koyra til Eiðis hvønn morgun, og tað riggar væl. Hann svevur á veg norð og fær ein góðan og tryggan morgun hjá mostir, meðan eg arbeiði, og so fær hann sín middagssvøvn í bilunum suður aftur.

Sunnvá gleðist um tað hjálp, sum hon og maðurin hava fingið. Og tað hevur havt serligan týdning at koma at kenna onnur foreldur at ov tíðliga føddum børnum.

Føroyska Prematurfelagið varð stovnað 28. oktober í fjørð. Sunnva Tausen, Bjørghild Hákunardóttir og Ragnhild Mørk valdu at seta felagið á stovn, tí tær allar høvdu átt ov tíðliga og allar saknaðu kunning um serliga tørvin hjá slíkum børnum.

- Tað hevur verið ótrúliga gott at hava onnur í somu støðu at snakka við. Eg kendi meg sum hønumammu, sum yvirvardi sonin. Men við at tosa við aðrar mammur at ov-tíðliga-føddum børnum, havi eg funnið út av, at eg eri ikki ónormal. Hóast ov-tíðliga-fødd børn eru ymisk, so stríðast vit eisini øll við nógv av tí sama.

### Kunnandi fyrilestur

Í dag eru 42 familjur limir í føroyska Prematurfelagnum, og elsta ov-tíðliga-fødda barnið er 18 ár.

Í annað kvøld – mikukvøldið – skipar Prematurfelagið fyri fyrilestri í Veistluhøllini í Landssjúkrahúsinum. Fyrilestrarhaldarin, er danska Jonna Jepsen, sum í 1992 átti tvíburðar tríggjar mánaðar ov tíðliga.

Síðani 1994 hevur Jonna Jepsen arbeitt við teimum trupulleikum, sum prematur – ella ov tíðliga fødd - børn hava. Í 2000 var hon við til at stovna danska Prematur felagið, har hon var formaður tey fyrstu árini. Harumframt rekur hon Preem Team, sum arbeiðir við kunning viðvíkjandi ov tíðliga føddum børnum. Eisini hevur hon skrivað fleiri bøkur um evnið.

- Eg gleði meg til fyrilesturin sum børn gleða seg til jólagávur. Eg vænti at fáa nógv at vita og nógv at hugsa um, sigur Sunnvá Tausen.

Vitan og kunning eru altavgerandi fyri foreldur sum seg, leggur Sunnvá áherslu á. Tí trupulleikarnir eru ikki altíð so sjónligir.

- Tað er sera ymiskt, hvussu slík børn eru fyri, men verður einki gjørt fyri eitt barn við tildømis trupulleikum við sansaintegratión, kann barnið fáa varandi mein. Men tá foreldur einki vita, kunnu tey heldur ikki hjálpa.

Tí er málbólkurin fyri fyrilesturin bæði foreldur og avvarandi, men eisini fólk, sum eru um ov-tíðligafødd børn og foreldur teirra, heilsustarvsfólk, pedagogar og lærarar.





